tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Fótbóltur og kuldi

Oddagrein

Nú er rættiligt hol sett á summarítróttin. Landskappingin í fótbólti byrjaði seinasta vikuskiftið, og komandi mánaðirnar fer hendan ítróttargreinin at verða nógv frammi – bæði millum manna og í fjølmiðlunum.

Seinastu dagarnar hevur verið kalt, og hóast mai mánaði nærkast, er kavi framvegis at hóma kring alt landið. Hetta nervaði ikki byrjanina í landskappingini, men spælarar og viðhaldsfólk gleða seg ivaleyst til, at tað verður lýggjari í veðrinum

Sosialurin fer framhaldandi at dekka fótbóltskappingina væl og virðliga, og tað verður gjørt eftir nøkunlunda sama leisti sum seinastu árini. Sosialurin hevur roynt at fingið eitt javnt støðið í ítróttarskrivingina, og vit royna framhaldandi at halda fast um tað støðið og at betra tað.

Hondbóltskappingini í vetur fekk nógv rúmd í blaðnum, og tað hava fólk verið fegin um. Hondbóltskappingin er vorðin meira spennandi, og nógv verður lagt fyri hjá nógvum av feløgunum. Tí er tað eisini áhugavert hjá fjølmiðlunum at fylgja við í hesi kappingini.

Í gjár spældi fótbóltslandsliðið landsdyst móti Liktinstein, og í blaðnum í morgin hava vit frásøgn úr Liktinstein, har eitt av blaðfólkunum er í hesum døgum. Vit fara sjálvsagt at fylgja væl við fótbóltslandsliðnum, sum hevur so nógv at týða fyri føroyskan fótbólt og fyri Føroyar sum heild.

Fyri stuttum høvdu vit prát við eina føroyska kvinnu, sum er búsitandi í Grikkalandi, og hon ivaðist ikki í týdninginum, sum fótbóltslandsliðið hevur fyri Føroyum sum ferðamannaland. Nógv fólk kring alt Europa og kring allan heim fylgja við í fótbóltskappingum, og við at vera við í slíkum høpi, tryggja vit okkum umrøðu í fjølmiðlum kring alt Europa.

Sosialurin fer at ynskja øllum okkara ítróttarfólki góða eydnu í summar, og vit fara at gera tað, sum vit megna, fyri at fylgja við í øllum ítróttargreinum í summar eisini.

Sosialurin

Viðmerking:

Kettlingar og Svartabók

Drepið heldur kettlingarnar.

Hesi boðini komu hvørt heystið, lestrarárini hjá mær í Danmark. Kolonihavamentanin var tá í hæddini. Har úti vóru útløgukøttar. Teir fingu hesar fittu ketlingarnar, sum fólk tóku til sín, men illa bar til at taka ketlingarnar við sær inn í býin, tá farið var heim aftur.

Ketlingarnir vóru nú so vandir við at fáa mat í munnin, at teir klóraðu ikki at finna sær sjálvum føði. Teir høvdu tí pínst, til teir doyðu í hungri. Tí var frægari at geva teimum ein bráðan enda.

Fólk eru sum ketlingar í nógvar mátar. Fáa tey ov nógv upp í hondina fyri einki, maktast áræðið at gera nakað sjálv.

Svartabók

Amerikumenn og danir vistu hetta fullvæl, tá teir í 60-unum løgdu ráð saman at sissa føroyingar, so hernaðarútgerð kundi setast upp í Føroyum. – Tað skuldi egnast so mikið, at føroyingar fingu hvørkraband, so teir gjørdu av við seg sjálvar, um teir táttaðu í. Veitast skuldi so mikið, at føroyingar klóraðu – »to hang themselves«.

Vorið sum hjálp at fáa!

Henda »hjálp« endaði í blokkstuðlinum.

Hjælp til selvhjælp

Hetta hoyra vit umaftur og umaftur, tá danir hjálpa tilafturskomnum londum. Tey skulu koma so mikið uppundan, at tey klára at manna seg sjálv og standa á egnum beinum.

Tað er tí ørkymlandi at hoyra fleiri danskar politikarar jabba upp í saman, at fáa vit sjálvstýri, sum minnir um loysing, verður kubbað á stokkinum – vit fáa eina stutta skiftistíð – blokkin fáa vit 3 ár aftrat.

Hava danskir politikarar virðing fyri sær sjálvum, hálsa teir um.

Tað er heilt burturvið at geva Føroyum nógv verri kor, enn teir unna øðrum tjóðum.

Verður samsvar við tað, danir veita øðrum, tá vit eina sømiliga skiftistíð, sum hvørki er ov stutt ella ov long – ja kanska ein kapitaliseraðan blokk.

Óli Mikkelsen

Landsstýrið og samgongan størsta hóttanin ímóti búskapinum

Fullveldisætlanin hjá landsstýrinum, er uppskriftin uppá arbeiðsloysi, fólkafráflyting og stagnatión. Hetta er niðurstøðan í væl undirbygdari grein, sum fyrrverandi fíggjarstjórin í landsstýrinum, Kári Petersen skrivar.

Hetta samsvarar við tað, sum stendur í Hvítubók, har millum annað myndin á síðu 141 vísir, hvørji stutt- og langtíðarárin tað hevur á búskapin, um ríkisstuðulin minkar.

Tað sama stendur í frágreiðingini frá Háskúla Íslands, sum ikki slapp við í Hvítubók. Henda frágreiðing er bara uppaftur ógvusligari í sínum niðurstøðum av negativu avleiðingunum.

Allar hesar frágreiðingar og útsagnir frá serkønum siga í grundini tað sama: Ætlanin hjá landsstýrinum við loysing og skiftistíð í 15 ár er høpisleys og verður eitt satt skrall fyri Føroyar.

At hetta skrallið so gerst uppaftur størri, um skiftistíðin verður styttri, sigur sig sjálvt.

Arbeiðsloysi, fólkaflyting og búskaparlig stagnatión

Hava føroyingar gjørt sær nóg greitt, hvat fer at henda við Føroyum, um landsstýrið við Fólkaflokkinum og Anfinni Kallsberg á odda sleppur at halda fram?

Landsstýrisuppskotið er uppskriftin uppá búskaparliga stagnatión, arbeiðsloysi og fólkaflyting, sigur búskaparfrøðingurin. Leystliga mett sigur hann, at ein kann rokna við eini fólkaflyting av umleið somu stødd, sum fyrst í 90-árunum.

7.200 fólk fluttu tá av landinum, og bert umleið

1.000 eru komin heimaftur til Føroya. Tey flestu,ið fluttu vóru ungfólk. Tey 6.200, sum ikki komu heim aftur, vóru 13 — 14 % av samlaða fólkatalinum, men av teimum 20-40 ára gomlu, taldu hesi umleið 25 %.

Hetta verða nakrar av avleiðingunum av høpisleysu ætlan landsstýrisins.

Heldur nýskipan

Eg vóni, at føroyingar hava gjørt sær greitt, at alternativið, og tryggi vegurin fram ímóti meira sjálvsavgerðarrætti, og einum berandi búskapi, har vælferðarsamfelagið verður ment og varðveitt, gongur ígjøgnum ríkisfelagsskapin. Ein nýskipan, sum Sambandsflokkurin hevur skotið upp, og saman við øðrum virkar fyri, er alternativið og tryggi vegurin fram.

Endamálið við hesum er, at londini við støði í egnum fortreytum, skulu hava loyvi til, og bestu møguleikar at mennast.

Sannast má tíverri, at í løtuni eru landsstýrið og samgongan størsta hóttanin ímóti búskapinum og føroyingum sum heild.

Edmund Joensen

Mótasýning og undirhald í Klaksvík

Leygarkvøldið verður skipað fyri einum tiltaki í Skálanum í Klaksvík, har millum annað nýggjast klædnamótin verður sýndur fram.

Handlarnir Cheap, JAP og Giggi fara at vísa nýggj klæði fram, og umframt mótasýningina verður eisini annað á skránni.

Lagt verður fyri við einum góðum døgurða, og Arnfríð Lützen, Niklas Heri Jákupsson og Ingi Isaksen fara at syngja og spæla og okkurt undirhaldið verður eisini.

Tað er 1. q á HF skúlanum í Klaksvík, sum skipa fyri tiltakinum, og tey siga, at kvøldið verður hugnaligt og undirhaldandi.

Kostnaður verður 200 krónur fyri hvønn persón, og tað ber til at melda seg til kvøldið á tlf. 457172, 220599, 457618 og 455843. Tilmeldingin skal gerast áðrenn í kvøld klokkan 21.00.

Tiltakið byrjar klokkan 19.30

Tøkk

Familjunnar vegna takka vit hjartaliga øllum, sum hjálptu og vístu samkenslu tá kæra mamma, vermamma og omma okkara

GITTA JOENSEN
Klaksvík

varð sjúk, doyði og fór til gravar.

Ein serlig tøkk til Sigrid og Kristian Niclasen, starvsfólkið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og tykkum øll í KFUM & K.

Annars takka vit øllum, sum sendu køkur, blómur og gávukort, fylgdu henni til gravar og komu til ervið.

Má Harrin signa tykkum øll.

Martin, Malena, Margit, Arnvør, Jákup Petur og Ólavur

Nýtt álit skal hjálpa politikarunum

– Virki mentanarlív kostar. Men játtaði peningurin er kortini ikki ein útreiðsla, men heldur ein innløga í samfelagið, segði Gunnar Hoydal millum annað, tá mentanarálit varð handað býráðsformanninum í Havn í gjár

Birgir Kruse handar Leivi Hansen, býráðsformanni í Havn, nýggja mentanarálitið. Mynd: Jens Kr. Vang

JOHN JOHANNESSEN

»Havnin - livandi, kveikjandi skapandi«. Hetta er heitið á nýggjum áliti um mentanarpolitik í høvuðsstaðnum. Álitið er gjørt av mentanarbólki mannaðum við átta fólkum, sum Tórshavnar býráð í januar í fjør setti. Bólkurin hevur havt 35 fundir síðani hann varð settur, og í gjár kundi formaðurin í bólkinum, Birgir Kruse, handa býráðsformanninum álitið.

Mentanarálitið telur 63 síður og viðgerð 10 høvuðsevni innan mentanina í høvuðsstaðnum. Hesi høvuðsevni eru býráðið og mentanarmál, skúlarnir, ítróttur in, børn og ung, tónleikur, myndlist, sjónleikur, bókmentir og skaldskapur, søvn og stovnar og síðani onnur mentanarmál, sum til dømis bygging, livandi myndir og telda og tøkni.

Áðrenn sjálva viðgerðina av ymsu evnunum, verður greitt frá meginsjónarmiðunum fyri mentanarpolitikki í Havnini og eftir viðgerðina er ein kapittul við uppskotum og tilmælum.

Mentan trupul at staðfesta

Birgir Kruse, lærari, hevur verið formaður í nevndini,ið hevur skrivað mentanarálitið. Tað var hann, ið handaði Leivi Hansen álitið á samkomu hjá Tórshavnar býráð í gjár.

Birgir Kruse segði røða síni, áðrenn álitið varð handað, at mentan er ógvuliga trupul at seta hol á og kann ikki staðfestast. Hann vísti á, at mentan er nakað, ið ásetir samleikan hjá okkum øllum alla tíðina, og er tískil nakað, ið broytist alla tíðina. Tí gjørdi hann greitt, at mentanarálitið er eitt avmarkað álit, gjørt yvir eitt avmarkað tíðarskeið av einari avmarkaðari nevnd.

Kortini segði Birgir Kruse seg vóna, at mentanarálitið fer at verða eitt hent amboð hjá býráðspolitikarunum, tá teir framyvir skulu taka avgerðir innan mentanarøkið, og við hesum ynskti hann býráðsformanninum góðan róður.

Formaðurin í bólkinum nýtti eisini høvi at takka býráðnum og mentanardeildini hjá býráðnum fyri, at býráðið setti bólkin til at viðgera mentan í høvuðsstaðnum.

Havnin er mentanarháborg

– Tað er ikki reyp, tá eg sigi, at Havnin altíð hevur verið mentanarháborgin í Føroyum, segði Leivur Hansen, tá hann fekk mentanarálitið handað. Hann vísti í hesum sambandi á, at býráðið altíð hevur lagt seg nógv eftir at stuðla mentanini, serliga í ár.

Býráðsformaðurin segði, at í ár stuðlar býráðið mentan við 15 milliónum krónum, og vísti hann á, at mentanin aldri hevur verið ríkari, enn hon er júst í hesum døgum.

Leivur Hansen fegnaðist um avrikið hjá arbeiðsbólkinum, og segði hann seg vera vísan í, at álitið fer at gera tað lættari hjá politikkarunum at taka avgerðir innan mentanarpolitik.

Eitt brot í mentanarálitinum mælir til, at ein fulfíggjað søga um Havnina verður givin út í bók. Hesum tilmæli sigur Leivur Hansen seg taka fult undir við, og vísti hann á, at býráðið hevur sett pening í grunn til hesa verkætlan, og hetta ætlar býráðið sær at gera hvørtár framyvir.

Býráðsformaðurin segði, at býráðið fleiri ferðir hevur roynt at fingið fólk at skriva søgu um Havnina, men enn hevur eingin hættað sær undir hesa uppgávu. Tó er eitt verk komið út um Tórshavnar Havn og eitt um Vatnsøguna í Havn. Hesi verk, heldur býráðsformaðurin, kunnu vera góður stuðul hjá tí ella teimum, ið ætla sær undir arbeiðið at skriva søguna um Havnina.

Trúarlívið ikki við

Gunnar Hoydal hevur verið skrivari í bólkinum, ið hevur gjørt mentanarálitið. Hann segði í røðu síni í gjár, at bólkurin hevur lagt seg eftir at tikið ymsu greinarnar av mentanini í høvuðsstaðnum við í álitið og síðani gjørt niðurstøður á einstaku økjunum.

Men Gunnar Hoydal gjørdi samstundis greitt, at mentan fevnir um so nógv, at tað ikki hevur borið til at tosa við øll innan mentanarøkið. Og ein avleiðing av hesum er, at bólkurin hevur latið vera við at viðgera trúarlívið. Hann vísti á, at trúarlívið í sær sjálvum er ein so stórur partur av mentanini, at hetta nærum krevur eitt álit í sær sjálvum.

Skrivarin í bólkinum nam eisini við samanhangin millum sosialpolitikk og mentanarpolitikk. Í hesum sambandi fegnaðist hann um, at býráðið nú hevur eina trivnaðarnevnd, ið viðger mentan og sosialpolitikk undir einum. Gunnar Hoydal segði seg nevniliga vera sannførdan um, mentan og sosialpolitikkur hanga ófrávíkiliga saman.

Arbeiðið á byggja nýggj hús til Fólkaflokkin er farið í gongd. Mynd: Jens Kr. Vang

Fólkaflokkurin byggir hús

Í gjár vórðu fyrstu lessini av gróti til undirstøði undir nýggju húsunum hjá Fólkaflokkinum lessað av uppi í Svanga í Havn

JOHN JOHANNESSEN

Nýggju húsini hjá Fólkaflokkinum uppi í Svanga í Havn skulu vera 128 fermetrar til støddar í trimum hæddum, kjallarahædd, miðhædd og lofsthædd. Liðugt er at grava út og í gjár vórðu fyrstu lessini av gróti til undirstøðið koyrd niðan í Svanga.

Fólkaflokkurin hevur aldri átt nøkur felagshøli. Í staðin hevur hann leigað seg inn ymsastaðni. Men nú varð hildið, at stundin var tann rætta til at fara at byggja. Enn er góð tíð eftir til næsta val, og búskaparliga støðan er eisini góð.

Í nýggju húsunum er ætlanin, at Fólkaflokkurin skal hava sekretariat, fundarhøli, og síðani skal møguleiki eisini vera fyri at gera sær ein bita. Húsini koma at líkjast einum vanligum sethúsum, men tey verða eitt sindur øðvísi innrættað.

Tað er ikki greitt, um Dagblaðið fer at halda til í nýggju húsunum hjá Fólkaflokkinum. Flokkurin upplýsir, at kjallarahæddin fyribils kemur at standa tóm, men, at hon kann nýtast til, hvat tað skal vera.

Fríggja- og leygarkvøldið
28. & 29. apríl
kl. 18⁰⁰ – 22⁰⁰

Meðan vit bíða:
Frítt salatborð

Høvuðsverði:
Kagga Búffur
ella
Pipar Búffur

Omaná:
Ísur við frukt

3 rættir einans 170,-

Borð kann bíleggjast
á tlf. 214170 ella 314170

Restaurant Kaggin